


# Alment settu starvsfólkini tryggja vælferðina



Val
ANNIKA OLSEN
Valevni Fólkafloksins
www.annikaolsen.net

Neyvan er nakar starvsbólkur í landinum so illa viðfarin í politiska kjakinum og á løgtingi, sum tey alment settu. Tað tykist sum, at landsins politikkarar og valevni hava gloymt, at vælferðin í landinum verður borin av teimum alment settu starvsfólkunum. Hetta ger seg galdandi úr vøggu til grøv og alt tað har ímillum. Vit hava øll hoyrt um, hvussu sjúkrarøktarfrøðingarnir hokna undir arbeiðsbyrðini í sjúkrahúsverkinum. Fyri kortum søgdu 13000 sjúkrarøktarfrøðingar seg úr starvi í Finlandi, tí eisini har hokna tey undir arbeiðsbyrðini. Tað er eisini eitt vælkent fyribrigdi hjá okkum, at fólk ikki støðast ella rýma úr almennum arbeiðsplássum, tí arbeiðstrýstið er ov stórt. Avleiðingin er fyrst, at starvsfólkini verða noydd til at slaka uppá fakligu dygdina í arbeiðnum, men i longdini gongur tað út yvir starvsfólkið sjálvt, og tí kenna tey seg noyddan at rýma, fyri ikki at ganga undir.

Vælferðarstøðan í landinum kann samanberast við eitt gistingarhús. Tess fleiri stjørnur gistingarhúsið hevur, tess fleiri og betur útbúgvin starvsfólk eru um gestirnar, tænastuútboðið er stórt, rúmumstøðurnar góðar og maturin við. Øll vita, at tað kostar nógv meira at gista á einum fimm stjørnu gistingarhúsi, heldur enn á einum tvey, trý ella fýra stjørnu gistingarhúsi. Ein viðkomandi spurningur er tí, hvussu nógvar stjørnur geva vit okkara vælferðarsamfelagi í dag og hvussu nógvar stjørnur ynskja vit, at tað skal hava í framtíðini og heilt realistiskt, hvussu nógvar stjørnur vilja vit gjalda fyri?

Sjálv eri eg sannførd um, at leggjast má á annan bógv fyri at betra vælferðartænasturnar. Teir ymisku fakbólkarnir mugu sleppa til orðanna at áseta eitt dygdargott tænastustig. Mál og uppgávur mugu ásetast og festast á blað, so at starvsfólk og brúkarar fáa innlit í, hvat væntast av teimum og hvat ein hevur krav uppá. Almennu leiðslurnar mugu sambinda mál, tørvandi arbeiðsorku og aðrar neyðugar fortreytir fyri, at málini kunnu røkkast. At fasthalda og tiltrekkja arbeiðsmegi má avgjørt eisini setast sum eitt mál í sær sjálvum, tí við hesi gongd er tað bara ein spurningur um tíð, til vit ikki hava starvsfólk at røkja vælferðartænasturnar.

Ein hin týdningarmesta uppgávan hjá komandi løgtingi verður at játta pening til vælferðaruppgávurnar og harvið avgera, um gjaldast skal fyri eitt tvey, trý, fýra ella fimm stjørnu vælferðarsamfelag. Tá tað er gjørt, eigur eitt neyvt eftirlit at verða við at arbeitt verður sambært settu málunum og at pengarnir verða brúktir til tað, teir eru játtaðir til. Stirvna játtanarskipanin eigur at broytast, so gjørligt verður at arbeiða yvir eitt fleir-ára skeið og ikki sum nú, bert 1 ár í senn. Ein skipan, sum byggir á málstýring og uppgávurøkt gevur í síðsta enda tað tænastustig, sum vit vilja gjalda fyri. So er tað upp til játtandi myndugleikan, tvs. løgtingið, og almennu leiðslurnar, ið hava ábyrgd av gjøgnumføringini, at tryggja at borgarin fær tað, hann rindar fyri.

Ein broyting má til. Eg vil arbeiða fyri eini broyting, sum betrar um tænastustøði og fyribyrgir tað ódámligu niðurgerðing, ið alment sett starvsfólk hava verið fyri úr politisku skipanini. Tað er púra burturvið at leggjast eftir tí vanliga starvsfólkinum. Tað eru jú tey, sum geva okkum vælferðartænasturnar líka úr vøggu til grøv.

# Kommunurnar skulu styrkjast



Val
HEÐIN MORTENSEN
valevni Javnaðarfloksins
www.hedinmortensen.com

Løgtingið tók avgerð um at skipa Føroyar sum eitt valdømi. Hetta frambrot bygdi millum annað á, at Føroyar í framtíðini skulu hava fíggjarliga og umsitingarliga sterkar kommunur.

Loysn má tí sum skjótast fáast á kommunubygnaðinum, so at Føroyar verða skipaðar í færri kommunur. Men tað er ikki nokk í sær sjálvum, tí kommunurnar skulu eisini hava fleiri uppgávur at røkja. Uppgávur, ið náturliga hoyra heima í kommununum, sum hava beinleiðis samband við borgararnar.

Tvey høvuðsøki, ið eiga at verða løgd út til kommunurnar at umsita, eru eldrarøktin og fólkaskúlin. Ofta verða kommunurnar róstar fyri sjálvboðið at hava tikið tøk á eldrarøktarøkinum við at byggja ellisheim og sambýli. Ongantíð fyrr byggja kommunurnar so nógvar og hartil framkomnar skúlar sum nú.

Samstundis hava kommunurnar nøktað tørvin á barnaansing, ið sum kunnugt varð stórur trupulleiki í nítiárunum. Eingin ivi er um, at kommunurnar megna at umsita eldrarøktina og skúlan eisini.

Við einum valdømi til løgtingið og við 7-9 sterkum kommunum, ið umsita øll viðkomandi mál fyri borgaran, fáa vit annað og munandi betri skipað samfelag.

Løgtingið og landsstýrið seta karmarnar og treytirnar, og kommunurnar umsita uppgávurnar samsvarandi, men kunnu altíð sjálvar velja at hava eitt hægri tænastustøði og fleiri tilboð, enn lógin áleggur.

Soleiðis fáa vit eitt eins høgt tænastustøði kring alt landið, men eisini møguleika fyri, at kommunurnar sjálvar raðfesta uppgávur uppaftur hægri í samljóði við tey ynski og krøv, ið borgararnir seta teirra kommunu.

Hetta skapar framburð, og hetta gevur betri eldrarøkt og betri undirvísing. Tí er neyðugt at skipa eina veruliga útleggingartilgongd til tess at styrkja kommunurnar.

Eg vil á løgtingi virka fyri, at meira ferð kemur á at loysa kommunala bygnaðin!

# Fyrisiting og rættartrygd



Val
JACOB VESTERGAARD
Fólkaflokkurin

Føroyska umsitingin og rættarskipanin eru enn á mangan hátt í føðingini ella als ikki komin so langt. Í slíkari støðu vil eitt hugtak sum rættartrygd at vera í miðdeplinum. Rættartrygd er eitt ógreitt hugtak, ið tað ofta verður farið lætt um í politiskum retorikki. Men grundleggjandi liggja nøkur heilt ítøkilig virði í hesum hugtaki, og her hugsi eg fyrst og fremst um, at borgararnir eiga at fáa eina fakliga góða og óhefta viðgerð av teimum myndugleikum, sum í ítøkiligum málum taka avgerð teirra vegna.

Av avgerandi týdningi er tað tí, at føroyskir fyrisitarar og dómarar eru so væl útbúnir sum møguligt og kenna so væl til føroysk viðurskifti sum møguligt. Tí má ein komandi samgonga virka fyri, at tað verður stovnað ein føroysk løgfrøðiútbúgving á Fróðskaparsetrinum, so at grundarlag verður lagt fyri eini manning innan føroyska umsiting og dómstólar, sum í størri og størri mun er á heimabana innan serføroysk løggávuøki. Hugsað verður eitt nú um føroyskan bygdarætt og landbúnaðarløggávu, ið danskir løgfrøðingar illa skilja og føroyingar sjálvir hava gjørt lítið við higartil.

Í dag verða flestu avgerðir móti borgarum tiknar í fyrisitingini, og koma tær oftast ikki fyri nakran dómstól. Tí er so serliga týdningarmikið, at royndarmannagongdin og -skipanin í fyrisitingini rigga væl. Seinastu árini eru stór framstig hend á hesum øki í Føroyum, har alsamt fleiri rættarøki verða løgd til kærunevndir, knýttar at Føroya Kærustovni. Sum landsstýrismaður í innlendis- og lógarmálum havi eg sjálvur nýliga verið við til at leggja kærur hjá borgarunum í málum eftir m.a. býarskipanarlógini, tinglýsingarlógini og matrikullógini frá landsstýrismanninum til nýggju Kærunevndina í lendismálum. Hetta má vera vegurin fram. Kærunevndirnar eru samansettar av trimum ella fimm serfrøðingum og kunnu á mangan hátt samanberast við dómstólarnar. Í flestu førum er væntandi, at hesar kærunevndir geva borgarunum eina betri viðgerð enn ein embætismaður undir landsstýrismanninum. Málsetningurin má tí vera, at kærur innan alsamt fleiri rættarøki verða løgd frá landsstýrismonnunum og yvir til kærunevndir.

Veruleikin er kortini í løtuni so, at landsstýrismenninir framvegis eru kærumyndugleikar hjá borgarunum innan eina ørgrynnu av samfelagsøkjum. Ikki minst verður her hugsað um sokallaðu landsstovnarnar, har tað er eitt yvir-undir samband við kærumøguleika beinleiðis til landsstýrismannin. Í slíkum førum er tað avgerandi fyri borgarans rættartrygd, at kæruvegurin verður røktur og riggar væl. Verður kæruvegurin avskorin, er rættartrygdin í vanda, tí vit vita, at dómstólarnir ofta eru tungir og trekir at fáa inn í fyrisitingarmál. Tískil er tað eisini so vandamikið, tá fjølmiðlarnir og onnur øsa almenning og politisku skipanina um einstøk mál, so endin verður, at borgarin í veruleikanum onga fyrisitingarligan kærurætt hevur. Landsstýrismenn mugu sjálvsagt ikki í tíð og ótíð og tilvildarliga leggja seg út í mál hjá landsstovnum. Hinvegin er eins umráðandi, at borgarin, serliga í meira prinsipiellum málum, sleppur at kæra avgerðir hjá landsstovnum, og at alt ikki verður lopið upp í varg, so at fyrisitingarligi kærumøguleikin og harvið rættartrygdin verður máað burtur.

Tað hevur tí stóran týdning at fáa ment løgfrøðiligt medvit og útbúgving heima í Føroyum, eins og at avgerðarmyndugleikarnir mugu skipast skilagott við kærunevndum, so at borgarans viðurskifti kunnu verða umsitin so rættartrygt sum til ber.